nøvn nú

Heilsanir

Gó›a mamma
Hjartaliga tillukku vi› 27 ára degnum í dag. Alt ta› besta í framtí›ini. Jesus vælsigni teg. Babba og eg elska teg.
Heilsan Samuel



Gó›i lítli, fitti Djóni
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum.
Kærar heilsanir omma, abbi og langomma



Gó›i Sonni gubbi
Hjartaliga tillukku vi› 40 ára degnum 19. aug. Tú sært so alvorligur út her, allarhelst er ta› fiskur tú hugsar um, ella hvat?
Ynskja vit hinumegin fjør›in

Gó›i ma›ur og pápi
Hjartaliga tillukku vi› 40 ára degnum 19. aug.
Ynskja kona og børnini



Gó›i Andrias sønne
Hjertelig tillykke med 7 års dagen sønne. Babba elsker dig. Jesus pappa velsigne dig! Pas på bilerne



Gó›i elska›i Magni
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára degnum í morgin. Eisini ein heilsan til Anitu.
Nógvar mussar og klemm frá ommu í Fuglafir›i



Gó›i Djóni
Hjartaliga tillukku vi› 3 ára degnum í dag. Jesus pápi signi framtí› tína.
Heilsan Bjartur, mamma og babba

Gó›i elska›i Magni!
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára fø›ingardegnum 20. august.
Kærastu heilsanir mamma og babba



Gó›i fitti stóribeiggi
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára fø›ingardegnum í morgin.
Muss og klemm frá Anitu

Gó›u Hansina og Dánial Jacob
Hjartaliga tillukku vi› studentsprógvinum. Øll gó› ynskir fylgja tykkum, nú tit aftur fara at royna tykkum heima í Føroyum.
Tær kærastu heilsanir mamma

Ein fø›ingardagsheilsan til systkinabørnini
frá tveimum ásko›arum
til dystin Herfølge-Glasgow Rangers.

Gó›i pápi, svigarpápi og abbi
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku vi› degnum í dag, nógv gó› ár í framtí›ini.
Bestu heilsanir frá okkum á Nor›skála

T¿kk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, i› mintust meg á 70 ára fø›ingardegi mínum 01.07.2000 og gjørdu mær dagin ógloymandi.
Blí›ar heilsanir Anna Petersen, Tórshavn

Gó›u Mary, Monika og Hallger›
Hjartaliga tillukku vi› 11, 7 og 6 ára døgunum 12., 15. og 24. august.
Heilsan Vivia og Paula

Gó›i ommubeiggi
Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardegnum í dag 19. august.
Bestu heilsanir Hannelina, Elsa og Erling

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** **25,- kr.**

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ....
....
....
....
....
....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ....
Bústaður: ....
Bygd/býur: .... Tlf.: ....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«

FØÐINGAR

3. august fingu Trine og Janus Trúgvason, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

9. august fingu Anja Hovgaard og Andrass Petersen, Argir, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3600 gr.

10. august fingu Bergljót og Jóan Magnus Johannesen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2650 gr.

10. august fingu Herit Joensen og Jónsvein á Rógvu, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2850 gr.

11. august fingu Finngerð og Dánjal Vang, Glostrup, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3486 gr.

11. august fingu Erla Leonsson og Torbjørn Poulsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3200 gr.

11. august fingu Tórunn S. Poulsen og Øssur Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

12. august fingu Ansa P. í Eyðansstovu og Fróði B. Skúvadal, Vestmanna, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

12. august fingu Sjanna Hentze og Petur Klein, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3200 gr.

13. august fingu Maria og Dánial Christiansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 59 cm. long og vigaði 5000 gr.

13. august fingu Annika Jacobsen og Hjalti Gleðisheygg, Syðrugøta, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4400 gr.

14. august fingu Heidi Midjord, Trongisvágur og Símin Jóhannus Nybo, Leirvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3660 gr.

14. august fingu Una Hansen og Gunnar Isfeld, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

15. august fingu Svanhildur Bjarnadóttir og Poul Anker Zachariasen, Thisted, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3590 gr.

17. august fingu Vivi Jacobsen og Elias Þ Eliasson, Skopun, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3975 gr.

17. august fingu Iris Andreassen og Jan Thomsen, Eiði, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4075 gr.

ANDLÁT

10. august
Birita Broderick, Tórshavn, fødd Alberg, 81 ár.

11. august
Óluva Bærentsen, fødd Thomasen, Skopun, 75 ár.

13. august
Olaf Hansen, Fuglafjørður, bús. í Søldarfirði, 84 ár.
Vilhjálmur Mohr Patursson, Tórshavn, 81 ár.

14. august
Martin Skoradal, 91 ár.

15. august
Símun Næs, Hvalba, 80 ár.

16. august
Marta Leona Poulsen, Froðba, bús. í Tórshavn, 76 ár.

Gullbrúdleyp

Leygardagin 26. august kunnu hjúnini Sigrid og Jóhan Ziskason, Tórshavn, halda gullbrúdleyp.

Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið á degnum, eru vælkomin í heimið á Mýrisnípuvegi 14 frá kl. 15-21.

90 ár

Mánadagin 21. august verður Herborg Petersen, ættað úr Búri í Skopun, 90 ár.

Herborg verður at hitta á Lágargarði frá kl. 15 til kl. 17.

KIRKJUR & SAMKOMUR

Gudstænastur 9. sunnudag eftir Trinitats

Havnar kirkja: kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40, Elsa Funding
Vesturkirkjan: kl. 11,
Hestur: kl. 12, Heri Joensen
Kaldbak: kl. 12, Bjarni Bæk
Skopun: kl. 12, Poul Hansen, Danmark
Skúvoy: kl. 12, altargongd, Jákup R. Hansen
Sjóvar kirkja: kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson
Sandavágur: kl. 11, Inga Poulsen Dam
Haldarsvík: kl. 11, altarg., M. R. Jacobsen og Annfinn Skåheim, aðalskrivari í norsku Heimamissiónini
Kunoy: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Árnafjørður: kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
Christianskirkjan: kl. 11, lestur
Norðskála: kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen
Glyvrar: kl. 11, altarg.
Elduvík: kl. 19, Jónsvein Bech
Sørvágur: kl. 11, altarg., David Johannesen
Hvalba: Ólavur Rasmussen
Tvøroyri: Petur Martin Rasmussen (útvarpað)

Ebenezer

Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond

Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.

Meinigheitshúsið í Havn

Møti kl. 18 við Hans Ole Bækgaard.
Týsdagin bíbliutími við Hans Ole Bækgaard, Róm. 5-8.

KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin 21. kl. 15 verður í KFUK Eldrasamkoma við Carl Weihe. Evnið: Tobis úr Apokrýfinum.

Rhema á Hálsi

Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti, har videobandið »Sex, lies and the truth« verður víst á stórskíggja.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli, Leivur Leivson talar.
Mánakvøldið kl. 20 møti á stórskíggja, har Ulf Ekman talar yvir evnið: 4 stig til vøkstur. Talan varð hildin á summarkonferansuni hjá Levende Ord, Bergen, í summar.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 06.
Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti, kl. 16 samkomufundur, kl. 22 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.

Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.

Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 17.30 bøn, kl. 18 útsendingarmøti fyri fam. Sunnivu og Hans Jacob Poulsen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Símun og Elin Hansen, Flatnagerði 10 A. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Sundalagi

Møti verður í morgin kl. 18 í samkomuhúsinum í Hósvík við luttøku úr Filadelfia í Havn.

Ørkin, Saltangará

Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Kayfinn Hammer, sum talar og syngur.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Ruth og Eskild, Hvalvík.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6–7.

Keldan í Skálafirði

Fríggjakvøldið kl. 20.30 »Vón fyri framman« við hugna, sangi og vitnisburðum, Hans og Oddvør Jacobsen luttaka.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 19 møti við Paula Høj.

Saron Vestmanna

Sunnudagin kl. 18 møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Karl og Elidu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 20. august kl. 16 heldur Jónsvein Bech, prestur, fyrilestur í bygdahúsinum í Norðadali »Hevur keltiskur kristindómur havt ávirkan í Føroyum«.

Møti í Danmark

Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, hevur hesi møti í Danmark.
Hirtshals:
Leygardagin 19. aug. kl. 19.30 í missiónshúsinum Vestergade 13.
Sunnudagin 20. aug. kl. 19.30 í missiónshúsinum Vestergade 13.
Harboøre:
Hósdagin 24. aug. kl. 19.30 í missiónshúsinum, Søndergade.
Esbjerg:
Sunnudagin 27. aug. kl. 15.00 í Zions kirken, Sognehuset, Nygårdvej 103.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Drekka verður aftaná.

Konfirmatión í Havnar kirkju

Heystkonfirmatiónirnar 2000 verða 8. og 15. okt. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju mikudagin 23. august kl. 15.00.
Markið millum Suðurstreymoyar eystara og vestara prestagjald er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur.

Læknavaktir

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033.

Eysturoy:
Leygardagin 19. august:
Magnus á Stongum, tlf. 423006, Eiði

Sunnudagin 20. august:
Andreas Petersen, tlf. 441086, Gøtu

Norðoyggjar:
Leygardagin 19. og sunnudagin 20. august:
Jens Nylander Madsen, tlf. 455045

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): Tlf. 371560

Suðuroy (suður): Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

Eitt ljós á gøtu míni

»… Og hann (Jesus) fór sum sigur hansara var, hvíludagin inn í samkomuhúsið!

Luk. 4.16 B

Ein ungur maður helt ein dagin fyri við eina eldri konu: »Tygum ganga bara í kirkju av vana!«. »Ja, er tað ein vani, so er tað ein góður vani!« svaraði hon. Ofta verður gjørt gjøldur burtur úr vanakristindómi, vanakirkjugongd, vanaaltargangi. Ikki minst hava tey, ið ikki ganga í kirkju ella til altars ella einki hava við kristindóm at gera, verið sera íðin at tosa um vanar.

Men munnu mótstøðufólkini hava hugsa um, at teirra mótstøða eisini kann vera ein vani? At tað eisini kann gerast ein vani ikki at ganga í kirkju, ikki at fara til altars, ikki at savnast um Guðs orð? At tað eisini er nakað, ið kundi verið rópt vanaheiðinskapur, vanafríteinking, vanahatur til livandi kristindóm?

Kanska tað var vert at hugsa um at endurskoða vanarnar, til tess at vita um hald er í teimum. Men so átti tað ikki bara at verið vanakirkjugangarar, ið skuldu endurskoða sínar vanar; eisini vanafríteinkjarar og vanamótstandarar áttu at endurskoða sínar. Tí at vit kunnu gott halda fast við tann og tann skeivleikan – eisini móti kristindóminum ~ inntil tað gerst ein vani.

Og skal tann eini vanin vrakast (vanakirkjugongd), hví skal hin (vanamótstøða) so ikki eisini?

Konan svaraði: »er tað ein vani, so er tað ein góður vani«. Hjá Jesusi var tað vani at fara í kirkjuna í heimbygd síni Nasaret hvønn heilidag. Hann mundi ikki hava nakran óvana fyri. Amen.

John S. Myllhamar, trúboðari